


www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 03 - 2013

# Statoil mest virkna oljufelagið í Mexikoflógva

Norska Statoil hevur fingið tillutað 15 nýggj leitiloyvi í Meksikanska flógvanum og hevur felagið harvið styrkt sína støðu í økinum sum tað felagið, ið hevur flestu leitiloyvi, omanfyri 340 veit heimasíðan hjá Statoil at siga. Vit eru nøgdir við úrslitið av hesum seinasta keypinum. Hesi eyka loyvini gera okkum før fyri at menna okkara strategi fyri framleiðslu í meksikanska flógvanum og at ganga á odda í hesum so týðandi og lovandi oljuøkinum, sigur Erik Finnstrom, sum er leiðari fyri leiting hjá Statoil í Norðuramerika. Statoil hevur arbeitt í USA og Kanada í 25 ár og er við í trimum framleiðandi leiðum umframt at vera partur av sjey leiðum, sum verða útbygdar. Norska Statoil er tað oljufelagið, sum hevur gjørt størstu og flestu olju- og gassfund seinastu tvey árini kring heimin. Eisini kann felagið vísa á eina sera hepna gongd, tá tað snýr seg um umhvørvisvernd.